LØGMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF JUSTICE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postrúm 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 25. november 2025
J. nr.: 25/31240-2

Svar

upp á

fyrispurning nr. 52-053/2025 eftir § 52 a í Tingskipanini um at dagføra útlendingalógina, frá Hannu Jensen, løgtingskvinnu

Spurningarnir vóru soljóðandi:

1. Hvussu gongur við tvørpolitiska arbeiðinum at dagføra útlendingalógina ella gera nýggja útlendingalóg?
2. Nær væntast, at komið verður á mál og eitt nýtt ella dagført uppskot verður lagt fyri Løgtingið?
3. Hvørjar vóru høvuðsorsakirnar til, at landsstýrismaðurin valdi at seta gongd á arbeiðið at dagføra útlendingalógina fyri Føroyar?
4. Eru ávís evni, har tvørpolitiska arbeiðið hevur víst, at serliga týðiligur tørvur er á at dagføra galdandi rætt í Føroyum á útlendingaøkinum

Svar:

Til spurning 1
Ein politiskur fylgibólkur, við einum umboði úr hvørjum flokki á Løgtingi, er settur í sambandi við arbeiðið at dagføra útlendingalógina fyri Føroyar. Fundur er við politiska fylgibólkin umleið annan hvønn mánað. Eg meti, at fundirnir í politiska fylgibólkinum ganga væl.

Til spurning 2

Eftir ætlan verður liðugt at gjøgnumganga núverandi útlendingalóg á sumri 2026. Síðani skal Udlændinge- og Integrationsministeriet gera uppskot til nýggja útlendingalóg fyri Føroyar, sum verður sent til ummælis. Ilt er siga nær uppskotið til nýggja útlendingalóg fyri Føroyar verður lagt fyri Løgtingið. Um arbeiðið gongur væl og landsstýrisfólkið, sum tá umsitur hetta málsøkið, ynskir tað, verður tað væntandi í fyrsta lagi á vári 2027.

Til spurning 3

Høvuðsorsøkin til, at eg valdi at seta gongd á arbeiðið at dagføra útlendingalógina fyri Føroyar var, at útlendingalógin, sum er frá 2001, á fleiri økjum ikki hóskar seg til ta støðu á útlendingaøkinum, sum vit hava í Føroyum í dag.

Til spurning 4

Útlendingalógin hevur tørv á at verða dagførd sum heild, men tvørpolitiska arbeiðið hevur víst, at tørvur serliga er á at dagføra ásetingarnar í sambandi við arbeiðs- og uppihaldsloyvir og ásetingarnar í sambandi við familjusameining, soleiðis at hesar verða meira í samsvari við samfelagsligu støðuna í Føroyum í dag.

Løgmálaráðið, tann 25. november 2025

Bjarni K. Petersen
landsstýrismaður